# 21 ára gamal veteranur

**Vongverjin í høgru hjá NSÍ er ikki bangin fyri, at liðið hjá honum ikki skal stríðast fyri at varðveita góðu støðuna frá í fjør, sjálvt um fleiri av royndastu spælarunum eru burtur**

JÓANNES HANSEN

Tað var í steypadysti í Runavík ímóti Sumba í 1999, at Brynjolvur Nielsen fyrstu ferð var á besta liðnum hjá NSÍ. Í 2000, tá ið Trygvi Mortensen var venjari, var hann fastur maður, árið eftir, tá ið Petur Mohr hevði ábyrgdina, var tað meiri út og inn av liðnum. Men í fjør spældi hann við í sekstan av teimum átjan landskappingardystunum. Og tað var serliga í steypafinaluni ólavsøkudag, at tað varð lagt merki til hansara. Støðan var 1–1, tá ið dómarin bríkslaði fyri brotssparki til NSÍ. Tað tóktist sum um, at Sjúrður Jacobsen, sum plagdi at hava ábyrgdina úr ellivu metrum, skuldi royna seg, men so var tað Brynjolvur Nielsen, sum fekk uppgávuna, og hann skoraði sigursmálið.

– Eg spurdi Sjúrð, um hann var klárur at skjóta, og tað segði hann seg vera. Men so rópti Jógvan Martin Olsen, venjarin, av beinkinum, at eg skuldi skjóta, og tað gjørdi eg so.

*Hevði tú frammanundan skotið nógv brotsspørk í NSÍ?*

– Eg hevði skotið tvær ferðir frammanundan í steypakappingini í fjør. Fyrru ferðina tá ið vit í fjórðingsfinaluni vunnu ímóti FS Vágum í Runavík eftir brotssparkskapping og seinnu ferðina, tá ið vit í seinnu hálvfinaluni vunnu 3–2 á grasvøllinum á Svangaskarði. Ta ferðina skoraði eg upp á brotsspark til 3–1.

*Hví heldur tú, at venjarin heitti á teg í finaluni?*

– Kanska tí Sjúrður hevði misnýtt onkra ferðina frammanundan og so eisini tí, at Jógvan Martin visti, at eg tvær ferðir hevði skorað upp á brotsspark á yngru landsliðunum. Fyrru ferðina var á U–17 landsliðnum ímóti Noregi, og seinnu ferðina var í Italia í EM undankapping ímóti Andorra.

*Hevur tú kent teg tyngdan av uppgávuni at vera brotssparksskjútti?*

– Yvirhøvur ikki. Vit fingu einki brotsspark eftir summarfrítíðina í fjør. Men í steypadystinum ímóti FS Vágum nú í vár fekk eg møguleikan aftur, og tað eydnaðist. Eg rokni bara við, at eg fái møguleikan, so leingi sum tað gongur væl, heldur Brynjolvur Nielsen. Hann fylti 21 ár 8. januar. Tá ið hann kom á 1. lið hjá NSÍ fyri fýra árum síðani, var hann sjálvandi ímillum teir yngstu, og tað hevur hann verið síðani. Men nú hava stórar útskiftingar verið á liðnum:

– Fleiri av teimum mest royndu eru burtur. Fimm nýggir spælarar eru komnir í 1. liðs hópin, so nú siga teir, at eg eri millum veteranarnar. At fleiri yngri enn tú eru á liðnum eigur at hava við sær, at tú kennir størri ábyrgd fyri øllum liðnum. So tað má eg royna at liva upp til.

*Kennir tú teg fullvísan í at eiga pláss á liðnum?*

– Eg royni at gera mítt besta, bæði undir venjing og í dystum, og so er tað upp til venjaran at gera av, um eg skal spæla. Í fjør kendi eg, at tað gekk væl. Men so var eg knappliga settur av, tá ið vit skuldu spæla landskappingardystir á Eiði og á Toftum. Venjarin segði, at sjálvsálitið var ov stórt. Sjálvandi var eg vónbrotin. Men eg royndi eisini at skilja avgerðina hjá honum út frá tí, at tá vóru bæði Pól Thorsteinsson og Djóni N. Joensen tøkir. Teir vóru báðir sera royndir spælarar, men teir vóru nógv skaddir í fjør. At tað so seinni eydnaðist hjá mær at sleppa aftur á liðið, sjálvt um teir báðir vóru tøkir, kendist sjálvandi sum ein persónligur sigur hjá mær.

## Av miðjuni og út í borðið

Brynjolvur Nielsen man vera ein av NSÍ spælarunum, sum hevur besta bóltførleikan. Á yngru liðunum var hann oftast sentralur miðvallari. Men síðani hann kom á 1. lið, hevur hann í nógv flestu førunum verið vongverji í høgru og onkra ferðina á miðvøllinum í høgru:

– Á yngru landsliðunum var plássið hjá mær á sentrala miðvøllinum burtursæð frá í einum dysti, tá ið eg var vongverji í vinstru. Tá ið eg var dreingjaliðsspælarin mangladu teimum fólk í 2. deild hjá NSÍ. Tá fór eg at spæla í høgra verjuborði, og tað havi eg gjørt síðani. Men tað er hugaligt, at venjarin hevur givið mær loyvi at taka lut í uppspælinum.

Í fjør kappaðist Brynjolvur m. a. við Arnfinn Langgaard, Pól Thorsteinsson og Djóna N. Joensen um plássini í verjuni. Nú eru teir allir burtur. Pól er farin aftur í B36, og hinir báðir eru givnir at spæla fótbólt á hægsta støði.

*Roknar tú við, at tit fara at standa tykkum eins væl, og tit gjørdu í fjør?*

– Higartil hevur tað gingið væl. Allir eru sera uppsettir, og eg haldi ikki, at tað hevur kenst aftur í steyadystunum, at vit hava mist nógv fólk, tíbetur. Vit taka ein dyst í senn, og so fáa vit at síggja, um vit aftur í ár fara at røkka í finaluna. NSÍ hevur ongantíð vunnið FM, so tað droyma vit eisini um, og so hevði tað verið stuttligt, um vit høvdu staðið okkum væl í Europa Cup kappingini.

*Hvussu við landsliðnum?*

– Tað hugsi eg ikki um í tí dagliga. Tað var hugaligt at vera á yngru landsliðunum. Jógvan Martin Olsen veit, hvat eg standi fyri, og um hann og Henrik Larsen eina ferð fara at senda boð eftir mær, so verði eg fegin um tað. Men tað nyttar ikki at hugsa ov nógv um sovoðrið. Tað má takast, sum tað kemur seg, heldur Brynjolvur Nielsen.



*Brynjolvur Nielsen skal spæla sentralan leiklut á NSÍ liðnum í ár.*
Mynd: Álvur Haraldsen



